## Match-vinnarin noyddist út

Jacob Bymer gjørdi einasta málið, sum kom í dystinum ímillum KÍ og B68, og hann var eisini vandamesti spælarin á KÍ-liðnum í fyrra hálvleiki.

Men beint fyri hálvleiki noyddist danski álopsspælarin av vøllinum, tá ið hann fekk ein skaða í lærið. Enn er ikki greitt, hvussu álvarsamur skaðin er, men hann forðar møguliga Bymer í at spæla næsta vikuskiftið.

Jacob Bymer kom úr Esbjerg til Klaksvíkar í fjør, men tá eydnaðist honum ikki at gera mál, hóast hann var nógv við og spældi væl til tíðir. Í ár hevur hann skorað bæði í steypakappingini og í landskappingini.

**-jm**

## 39 ára gamal unglingi

Marek Wierzbicki er ein av útlendingunum, sum hevur verið heilt leingi í Føroyum. Heilt afturi í 1993 kom hann fyri fyrstu ferð til landið, tá Piotr Krakowski styrkti B71-hópin við honum, og síðani hevur hann ferðast nógva staðni kring landið.

Í ár er tað aftur í KÍ, at hann roynir seg. Her var hann eisini í 1999 og 2000, og fyrra av hesum árunum var hann við til at vinna 17. meistaraheitið hjá felagnum. Og tað er einki ivast í, at áskoðararnir fegnir síggja eina endurtøku av hesum.

Sjálvur fylti Marek 39 ár mánadagin, men hóast hetta, so tóktist hann als ikki merkjast av hesum sunnudagin. Sum vinstri bakkur hevði hann sera gott tak á allan dystin, og við hetta lag er einki at ivast í, at hann framvegis eigur fleiri góð ár eftir á vøllinum.

**-jm**

KÍ-B68 1-0 (1-0):

# B68 bjóðaði av, men KÍ vann

**Toftamenn vildu spæla við í fyrsta umfarinum av landskappingini, men heimaliðið kláraði at fáa sigurin heim, hóast tað stóð á ímóti endanum av dystinum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fleiri av dystunum í ár hevur B68 spælt rættiliga verjukent. Teir hava møguliga ikki hildið seg verið so væl fyri, sum onkur av hinum liðunum, og tí hava teir lagt dentin á verjupartin og síðan skjót mótálop.

Men tey, sum væntaðu eitt verjukent B68-lið til dystin í Klaksvík, fóru skeiv. Toftamenn løgdu seg ikki bara aftur at verja, men bjóðaðu av fram eftir vøllinum eisini.

Fyrsta korterið av dystinum tóktist tað næstan, sum at heimaliðið var eitt sindur ørkymlað av ágangandi byrjanini hjá B68, og KÍ fekk ikki sítt spæla at ganga. B68 hevði fleiri royndir á KÍ-málið fyrsta partin av dystinum, og Súni Fríði Barbá og Øssur Hansen vóru við í tí mesta hjá gestunum.

Kjansirnir vóru ikki opnir, men royndirnar vóru frískar, og meira enn einaferð mátti Jákup Mikkelsen verja fyri.

### KÍ fekk mál

Men so hótti KÍ einar tvær ferðir, og so gav tað úrslit beinan vegin. Miðskeiðis í fyrra hálvleiki var Erling Fles sendur av stað í vinstru, hann legði flatt inn til nærmastu stong, og har kom Jacob Bymer rennandi og stúrdi bóltinum hegnisliga í handara síðunet – ein flott detalja av danska álopsspælaranum.

Jacob Bymer var størsta hóttanin hjá KÍ fram eftir vøllinum í fyrra hálvleiki, til hann noyddist av vøllinum við skaða. Hann átti tó at fingið eitt mál afturat, tá ið hann var púra leysur mitt fyri, men hann sendi innleggið himmalhøgt upp um málið.

Eftir at KÍ hevði fingið málið, fekk liðið meira spæl, og teir stýrdu hendingunum meira. B68 var ikki heilt so ágangandi longur, men teir høvdu onkrar atsóknir. Einu ferðina høvdu Øssur Hansen og Eyðstein Skipanes eina góða frísparkskombinatión, sum B68 helst átti at fingið meira burturúr.

### Gekk báðar vegir

Í seinna hálvleiki leikaði á báðar vegir. KÍ royndi støðugt at fáa eitt mál afturat, so at sigurin var tryggjaður, meðan B68 royndi at fáa útjavnandi málið. Øssur Hansen kom eitt skiftið rættiliga upp í spælið, og hann var tann, sum skapti mest á liðnum hjá B68. Hann reikaði nógv um vøllin, og KÍ'arnir høvdu í løtum ilt við at steðga honum.

B68 fekk framvegis ikki teir opnu kjansirnar, so hvørt sum dysturin leið, royndu teir seg alt meira við longu bóltum fram í brotsteigin. Seinastu tíggju minuttirnar sendu teir Mortan Hansen inn sum triðja álopsspælaran, og tá trýstu teir heimaliðið í løtum. Longu bóltarnir kundu havt givið úrslit, men hesaferð kláraði KÍ-verjan at rudda burtur hvørjaferð, hóast tað stóð á onkuntíð.

KÍ royndi seg við mótálopum, og heimaliðið fekk eisini størsta kjansin stutt fyri leiklok, tá ið gott og kvikt spæl hevði við sær, at Arnold Joensen gjørdist leysur í høgru. Hann dró inn móti Albert Sævarssyni, men so sendi hann bóltin fram við málinum.

B68 gjørdi eina seinastu roynd, høvdu onkur hornaspørk, men mál fingu teir ikki.

### Frísk toftaroynd

KÍ hevur ongan dyst tapt í steypakappingini ella landskappingini í ár, og hóast liðið ikki altíð hevur spælt sannførandi álopsfótbólt, so er liðið væl skipað, og tað er trupult hjá mótstøðuliðunum at spæla seg ígjøgnum.

B68 gjørdi tó ein fríska roynd hendan dagin, og við teimum spælarunum, sum liðið hevur fingið afturat seinastu vikurnar, eru tekin um, at úrslitini fara ikki at vera so vánalig, sum tey vóru í steypakappingini. Í øllum førum var himmalvíður munur á hesum B68-liðnum og tí, sum spældi fyrstu dystirnar í hesum árinum.

KÍ sleppur næstu ferð at royna seg ímóti B36 í Gundadali, meðan B68 skal spæla fyrsta dystin á nýggja graslíkisvøllinum á Svangaskarði ímóti GÍ sunnudagin.



*Toftamenn høvdu í løtum gott tak á vertunum, men stigini fóru tó ongan veg úr Klaksvíkini sunnudagin*

*Mynd: SáH*

## Dysturin í tølum

**KÍ-B68 1-0 (1-0)**
1-0: Jacob Bymer
**KÍ:** Jákup Mikkelsen – Leon Bjartalíð, Niclas Niclasen, Alexander Djordjevic, Marek Wierzbicki – Arnold Joensen, Jan Joensen, Atli Danielsen, Símun Joensen (Eyðun Klakstein, 65.) – Erling Fles (Julian Samuelsen, 83.), Jacob Bymer (Stig Edvin Aksnes, 44.)
**Gult kort:** Alexander Djordjevic, Símun Joensen, Leon Bjartalíð
**B68:** Albert Sævarsson – Oleif Joensen, Herbert í Lon Jacobsen, Bogi Petersen, Kári Sigvardsen – Jóhan Petur Poulesen, Eyðstein Skipanes, Mikkjal Thomassen, Øssur Hansen, Øssur Jacobsen – Súni Fríði Barbá
**Gult kort:**
**Dómari:** Dagfinn Olsen

## Sumbingar krøkja seg í oddin

Eins og í fjør, so tørnaðu Sumba og VB saman longu í fyrsta umfarinum av landskappingini í aðru deild, og hesaferð varð tað so Sumba, sum dróg longra stráðið.

Á Krossinum megnaði heimaliðið at vinna 2-1, men tað stóð ofta nógv á, soleiðis sum tað ofta ger í eini grannauppgerð.

Bert eitt mál kom fyri steðgin, og var tað heimaliðið, sum átti hetta, men vágbingar góvust ikki so. Tað eydnaðist teimum eisini at javna, men móti dystarenda fekk Sumba tillutað brotsspark, og hetta setti Norbert Luczak trygt í netið til endaligu støðuna.

Spælið sum so, var ikki tað heilt stóra at reypa um hjá nøkrum av liðunum, men hjá Sumba ræður fyrst og fremst um at halda lív í vónunum um uppflyting. Hjá VB skal sessurin í deildini fyrst og fremst varðveitast, og ein ósigur fyri Sumba á útivølli verður so neyvan tað, sum kostar hendan.

**-jm**

**Sumba-VB 2-1 (1-0)**
1-0: Karl Lisberg
1-1: Sigmund Mikkelsen
2-1: Norbert Luczak (br.)



NSÍ-VB 1-1 (1-1):

# Bara mál úr ellivu metrum

**Vágbingar vóru ikki komnir at pakka seg niður. NSÍ vildi hava alt á heimavølli, men hvørgin parturin megnaði at fáa mál í opnum spæli**

NSÍ–VB
*Jóannes Hansen*

Vágbingar kundu væl liva við at fara úr Runavík við einum stigi. Sum tað tók seg upp fram ímóti dystarenda, so kundu teir á heimaliðnum havt mist øll stigini. Tað hevði verið ov nógv av tí góða. Síðstu løtuna setti VB, sum tá hevði fríska lotið undan, báðar, sum teir høvdu á beinkinum inn á vøllin, og í báðum førinum var talan um meiri verjukendar spælarar, sum loystu meiri álopssinnaðar av.

Poul N. Poulsen loysti í síðsta minutti Birgir Jørgensen av. Tað var um reppið, at ungi maðurin í yvirtíðini syrgdi fyri, at øll stigini fóru suður til Vágs. Milan Kuljic, sum var mest eyðsýndi konstrutivi maðurin á vøllinum (hann hevði verið góður hjá NSÍ at havt!) spældi eitt tvey við Poul, sum var um reppið at gerast leysur, men hann var ikki nóg skjótur, og so varðveitti NSÍ eina stigið, sum tað næstan hevði verið synd, um teir høvdu mist.

Størsta møguleikan hevði Milan Kuljic heilt tíðliga. Hann gjørdist púra leysur við NSÍ málverjanum, men Jens Martin Knudsen vísti sína styrki, og so spurdist ikki meiri burturúr.

Bæði liðini vildu leypa á, men verjuspælið var meiri sannførandi enn álopsspælið, og so stóðust ikki nógvir møguleikar burturúr. Kári Hansen royndi seg við langskoti, sum Bjarni lyfti upp um til horna. Eftir innleggið var eitt sindur vandamikið frammanfyri VB málið, men einki spurdist burturúr.

### Avgerandi støðurnar

Kring hálva tíman brikslaði Lassin Isaksen tvær ferðir fyri brotssparki. Fyrru ferðina var eftir at Milan Kuljic í nærdysti við Áka L. Petersen, sum hevur trýst Messias út á beinkin, var farin um koll. Milan umsetti sjálvur úr ellivu metrum.

Tveir minuttir seinni lá bólturin á brotssparksblettinum í hinum endanum. Eftir langa framlegging fór Jónstein Petersen í nærdysti við Eyðun Jacobsen um koll, og neutrala uppmenninir úr Klaksvík søgdu, at tað var brotsspark. Sjúrður Jacobsen var tryggur, tá ið hann skoraði.

Í 1. hálvleiki hevði NSÍ undan vindinum betri tak á samanspælinum, enn teir høvdu eftir steðgin. Tað stóðust ikki serliga vandamiklar støður burturúr. Men einar tríggjar ella fýra ferðir var um reppið, at fleirtalsstøður kundu havt borið opnar støður við sær. Í øllum førunum vórðu skeivar avgerðir tiknar, tá ið tað mest ráddi um, og so spurdist einki burturúr.

Undan steðginum hevði NSÍ væl fleiri hornaspørk, enn VB hevði. Einki spurdist burturúr. Fram ímóti dystarenda var Óli Hansen, sum tá var í álopinum, um reppið við høvdinum at stýra innleggi í málið, men hann fekk ikki beint sera skrúvandi bóltinum ta kósina, sum hann hevði ætlað sær.

Eftir steðgin hevði NSÍ ilt við at samanspæla á miðvøllinum. Tá var ofta talan um langar sendingar, sum VB verjan ikki hevði trupulleikar at lesa og harvið byrgja fyri. Tað gjørdist ikki betri hjá NSÍ, tá ið besta álopsvápnið hjá teimum, Helgi L. Petersen, miðskeiðis í 2. hálvleiki noyddist at taka seg burturúr, tí hann var skaddur.



*Milan Culic legði VB á odda við brotssparki, men seinni javnaði Sjúrður Jacobsen. Somuleiðis við brotssparki*

### Dysturin í tølum

**NSÍ–VB 1–1 (1–1)**
0–1: Milan Kuljic br 28.
1–1: Sjúrður Jacobsen br 32.
Dómari: Lassin Isaksen
NSÍ: Jens Martin Knudsen – Dánial Hansen, Óli Hansen, Áki L. Hansen, Sjúrður Jacobsen – Andy Olsen (Jóhan Troest Davidsen, 81.), Brynjolvur Nielsen, Kári Hansen, Jónstein Petersen (Jústinus R. Hansen, 54.) – Gert Langgaard, Helgi L. Petersen (Messias Perreira, 64.)
Gult kort: Helgi L. Petersen 55., Kári Hansen 65.
VB: Bjarni Johansen – Mortan úr Hørg, Anders Sørensen, Eyðun Jacobsen, Dalius Stalelinas – Palli Augustinussen (Jón Gærdbo, 83.), Jákup Olsen, Milan Kuljic, Símun Samuelsen – Mindaugas Grigalavicous, Birgir Jørgensen (Poul N. Poulsen, 90.)
Gult kort: Mortan úr Hørg 53.
Lassin Isaksen

## AB vann á vindinum

Veðrið var avgjørt ikki til nakað polerað fótbóltsspæl, tá strembandi AB og óroynda LÍF dystaðust leygardagin.

Nógvur vindur var eftir váta vøllinum, og hetta gjørdi fyri tað mesta, at líkindini at spæla fótbólt vóru at kalla eingin.

Leingi var eisini líkt til, at talan skuldi gerast um málleysan javnleik, men í seinastu løtu fingu gestirnir tó avgjørt dystin, tá Pætur Dam Jacobsen brádliga gjørdist leysur.

Sum nevnt, so var talan á ongan hátt um nakað polerað fótbóltsspæl, men tað munnu tey á Argjum leggja vertin á. Hjá teimum vóru stigini tey týdningarmestu, og so ræður um at halda fast um oddastøðuna.

Hjá leirvíkingum er ikki stórt annað at gera, enn at halda á fram at stríðast. Talan er um nógv ungt fólk á liðnum, og vantandi royndirnar koma helst at viðføra óstøðug avrik. Stríðsviljan-um bilar tó sjáldan nakað, og tað munnu eisini vera fá lið, sum rokna við léttari uppgávu, tá vitjað verður í Leirvík.

**-jm**

**LÍF-AB 0-1 (0-0)**
0-1: Pætur Dam Jacobsen

## Ikki nóg gott



Jógvan Martin Olsen, venjarin hjá NSÍ, heldur ikki, at teir kunnu vera nøgdir við at fáa eitt stig burturúr fyrsta heimadystinum.

– Um tú ætlar tær at vera við, har tað gongur fyri seg, so er javnleikur á heimavølli ikki nóg mikið. Í 1. hálvleiki haldi eg, at tað hekk hampuliga væl saman hjá okkum, men vit eru ikki nóg kaldir í støðunum, sum eiga at verða avgerandi. Eftir steðgin broytist spælbýtið soleiðis, at bólturin er meiri á okkara hálvu, enn hann frammanundan hevði verið.

*Tú tókst fremsta álopsspælaran út?*

– Helgi varð skaddur, og hann bað um at verða útskiftur. Tað sama var galdandi hjá Jónsteini Petersen. Vit vóna, at teir báðir verða tøkir aftur, tá ið vit sunudagin skulu inn til Fuglafirðar.

**jh**

## Jóhan fyri fyrstu ferð

Tá ið tað restaðu tíggju minuttir í Runavík sunnudagin, varð Jóhan Troest Davidsen settur inn á NSÍ liðið. Hetta var fyrsta ferðin, at blaðungi spælarin var á besta NSÍ liðnum í landskappingardysti. Hann loysti Andy A. Olsen av. Andy beit seg fastan í besta NSÍ hópinum í fjør.

Jóhan hevur verið á U–17 landsliðnum, og hann hevur verið uttanlands og royndarvant – eitt nú í Brøndby. Troest boðar frá, at gamli fimleikarin og svimjarin Kaj Aage Troest er abbi hansara. Davidsen sigur, at pápin er Fróði Davidsen. Í Kramer tíðarskeiðnum mitt í og seinnapartin av áttati árunum var Fróði ungur og evnaríkur B68 miðvallari.

**-jh**

## Sá ikki brotssparkið

Superveteranurin í VB málinum, Bjarni Johansen, var ikki misnøgdur við at hava eitt stig í viðførinum í góðveðrinum um Suðuroyarfjørð sunnukvøldið. Men hann segði seg ikki duga at skilja, hví dómarin hevði bríkslað fyri NSÍ brotssparkinum:

– Lassin var staddur úti við miðstrikuna, tá ið hann bríkslaði. Støðan var út móti brotsteigarmarkinum og í borðinum. Eg metti meg vera væl betri fyri at síggja støðuna, enn dómarin var. Eg helt ikki, at Mortan úr Hørg togaði Jónstein Petersen niður. Heldur sá eg tað soleiðis, at Mortan fekk kroppin framum mótstøðumannin, sum so legði seg niður. Tað er tó ikki sjónarmiðið hjá mær, men tað hjá dómaranum sum telur, staðfestir VB málverjin.

Onkrir vágbingar fóru norður um leygardagin. Teir, sum fóru norður sunnudagin, noyddust av seingini klokkan hálvgum seks. Tá ið klokkuni leið at hálvgum tólv sunnukvøldið vóru teir við hús aftur. Men ferðin hevði ikki verið so galin, tí veðrið hevði verið av tí besta, og teir høvdu fingið eitt stig suðuraftur við.

**- jh**